# KT-handil í nýggj hølum

KT-handilin 7bit flutti um vikuskiftið í nýggj høli í Saltangará, og tað gevur fleiri møguleikar.

Síðani 2004 hevur 7bit veitt fyritøkum og privatum KT-tænastur, og viðskiftafólkini hava fyri tað mesta verið av leiðini við Skálafjørðin. Kári Sigvardsen, sum eigur handilin saman við Vilhelm Nielsen, sigur, at tænastuparturin hevur verið høvuðsarbeiðsøkið, men nú var søluparturin vaksin so mikið nógv, at gomlu hølini vóru ikki hóskandi longur.

Tí er 7bit nú flutt í gomlu skrivstovuhølini hjá OCD í Saltangará.

- Í nýggju hølunum hava vit riggað ein spildurnýggjan og innbjóðandi handil, har serliga farteldur hava fingið nógv og gott hyllarpláss, umframt at vit hava skrivstovur, verkstað, goymslu, fundarhøli og kaffistovu, sigur Kári Sigvardsen. Hann leggur afturat, at vørugoymslan og úrvalið eru munandi størri nú.

**árni**



*Tá 7bit lat upp í nýggju hølunum leygardagin, lutaði handilin eina farteldu burtur millum viðskiftafólkini. Her sæst tann hepni vinnarin saman við starvsfólkunum í 7bit.*

First Lego League Føroyar:

# Samansetta liðið sigraði

**Tað var samansetta liðið frá Argja skúla og venjingarskúlanum, sum sigraði, tá finalan í First Lego League Føroyar varð hildin í Klingruni á Føroya Tele leygardagin. Tey skulu í næstum til Svøríki at umboða Føroyar í finaluni fyri Norðanlond**




*Ein partur av First Lego League snýr seg um at fyrireika eitt so flott show sum gjørligt. Her síggja vit nakrar gentur úr skúlunum í Havn framføra*

FIRST LEGO LEAGUE
*Orð: Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

Longu klokkan átta leygarmorgunin vóru 150 føroyskir skúlanæmingar savnaðir í Klingruni í Hoyvík hjá Føroya Tele. 14 lið og leiðarar teirra pyntaðu básar og fyrireikaðu seg til finaluna.

Ætlanin fyri dagin var rættiliga greið. Fyrst skuldu bólkarnir í eini framløgu vísa á úrslit teirra í arbeiðinum við ársins tema, sum var nanotøkni.

Eftir hetta skuldu bólkarnir kappast á ársins bana, har tey við robottum skuldu loysa ymsar uppgávur.

Tá hetta var avgreitt skuldu næmingarnir greiða frá, hvussu tey høvdu bygt og programmerað teirra robott. Seinasta uppgávan hjá næmingunum var eitt halda eitt show.

### Sjey virðislønir

Virðislønir vórðu lætnar fyri allar ymsu partarnar av kappingini, og tilsamans vóru sjey ymsar virðislønir at kappast um.

Virðislønina fyri best innlit í nanotøkni, fekk samansetta liðið, K.U.R.T, við næmingum úr Argja- og Venjingarskúlanum. Samstarvsvirðislønina fingu næmingar úr Skála skúla, Junior Kids. Virðislønina fyri tøkni og design fekk bólkurin Doctor Frans úr Sankta Frans skúla, og bestu framløguna hin bólkurin úr Sankta Frans skúla, sum rópti seg P.U.M.A. Síðani skuldu næmingarnir kappast í robottkappingini á bananum. Hesa kappingina vann bólkurin K.U.R.T, meðan Junior Kids gjørdust næst fremstir.

Hesi úrslit høvdu við sær, at tá allar kappingarnar vóru taldar saman, so var tað samansetta liðið, K.U.R.T, sum hevði savnað sær flest stig, og tíð endaði ovast og vann kappingina.

### Dómarar við tyngd

Finalan leygardagin var endin á eini átta vikur drúgvari prosess hjá luttakarunum – uttan K.U.R.T, sum nú skulu fyrireika seg til Skandinavisku finaluna í Västerås í Svøríki.

Næmingarnir hava tikið kappingina í stórum álvara og gjørt sera nógv burturúr.

Og fyri at løna hesum aftur og vísa, at fyrireikararnir eisini taka kappingina í allar størsta álvara, so hava teir syrgt fyri einum dómaraborði við væl skikkaðum fólki, og taldist løgmaður, Jóannes Eidesgaard, millum dómararnar saman við landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm og stjóranum í Føroya Tele International, Tróndur Djurhuus.

Jóannes Eidesgaard luttók ikki einans sum dómari í kappingini. Hann setti eisini finaluna leygarmorgunin við eini lítlari røðu.

– Eg eri sera hugtikin av hesi kapping, tí tit ungu verða stimbraði at arbeiða sjálvstøðugt, og samstundis í toymi. Tit menna hesi evni saman við áhuganum fyri náttúrutøkni. Tit læra, at ogna tykkum vitan og at nýta vitanina gjøgnum kreativu tilgongdina og eisini at bera vitanina víðari, segði løgmaður, Jóannes Eidesgaard, millum annað í setanarrøðu síni.

### Nr. 6 av 12 londum

Til sjálva kappingina leygardagin, var Jan-Oddvar Sørnæs og vitjaði saman við einum av stigtakarunum til at fáa First Lego League tvørtur um Atlantshavið og higar. Jan-Oddvar Sørnæs er professari á Handilsháskúlanum í Bodø, og umframt at vera eygleiðari

## Um First Lego League:

Ætlanin við First Lego League er fyrst og fremst at menna og økja um áhugan hjá børnum og ungum fyri náttúruvísind, og at geva børnum góðar royndir at arbeiða við verkætlanum. Hugskotið er, at barnið sjálvt er drívmegin í arbeiðinum, og at tey "vaksnu" einans eru við til at hjálpa og hava eftirlit við gongdini.

First Lego League er ein verkætlan, sum fevnir yvir átta vikur og er fyri ungdómar frá 10 til 16 ár. Talan er um eina tvørfakliga verkætlan, har høvuðsdentur verður lagdur á náttúruvísind, kreativitet og framløgu.